# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit hava fleiri prógv og ætla at útvega fleiri fyri at fáa staðfest, at Chavez er sinnissjúkur*

*(Henry Ramos Allup)*

# Bush til Miðeystururs í dag

**Amerikanski forsetin vónar framvegis at fáa ísraelsmenn og palestinar at skriva undir eina friðaravtalu í hesum árinum**



*Á ferðini skal George W. Bush millum annað tosa við ísraelska forsætisráðharran, Ehud Olmert*

Tá George W. Bush kemur til Ísraels í dag, er tað hansara fyrsta almenna vitjan har, og soleiðis er eisini, tá hann seinni fer at vitja Vestara Áarbakka.

Í novembur skipaði Bush fyri ráðstevnu í Annapolis, og hóast partarnir søgdu seg vera komnar nærri einari semju tá, hevur tíðin síðani víst, at tað er framvegis langt á mál, skrivar AP.

Bush er júst farin undir sítt seinasta ár í Hvítu Húsunum, og hann hevur sagt, at hansara mál er at fáa frið í Miðeystri, áðrenn hann leggur frá sær. Men eygleiðarar í Miðeystri vænta ikki, at hann fer at røkka hesum málinum.

Ætlandi skal Bush brúka tríggjar teir næstu dagarnar upp á støðuna millum ísraelsmenn og palestinar, men eygleiðarar vænta ikki nøkur stórtíðindi haðani, skrivar Reuters.

Iran er eisini eitt evni á ferðini hjá Bush í Miðeystri, og ætlanin hjá forsetanum er at fáa stuðul frá arabiskum londum í stríðnum við Iran.

# Brotsmenn verða stoyttir oman

**Í Iran eru tveir menn dømdir til deyða fyri neyðtøku, og revsingin er, at teir skulu stoytast oman av einum hamri**

- Tað er andstyggiligt, at eitt stýri skal brúka tílíkan avrættingarhátt í 2008. Hetta er spýggiligt, sigur leiðarin fyri norsku deildini hjá Amnesty International, John Peder Egenæs, við Aftenposten.

Teir báðir menninir kærdu deyðadómin, men fyrradagin staðfesti iranski hægstirættur dómin, og at menninir skulu stoytast oman av einum hamri. Teir eru dømdir fyri at hava neyðtikið tveir ungar menn, og vanliga revsingin í Iran fyri neyðtøku er deyðarevsing.

Amnesty International heldur, at teir nógvu deyðadómarnir í Iran í seinastuni eru eitt tekin um, at átrúnaðarligar kreftir hava fingið størri ávirkan. Hetta hevur verið serliga sjónligt, síðani Mahmoud Ahmadinejad gjørdist forseti.

Í fjør vórðu minst 297 fólk tikin av døgum í Iran, og tað var tríggjar ferðir fleiri enn í 2005. Higartil í ár eru minst 14 fólk avrættað, teirra millum tann 27 ára gamla Raheleh Zamani, sum átti tvey smábørn.



*Hendan myndin er frá einum mótmælistiltaki ímóti deyðadómunum í Irak*

*(Mynd: AP)*

# Siga forsetan vera sinnis-sjúkan



*Hugo Chavez. Er hann sinnissjúkur?*

**Andstøðan í Venesuela vil hava hægstarætt at staðfesta, at Hugo Chavez, forseti, er sinnissjúkur**

Tað er flokkurin Demokratiskt Átak við Henry Ramos Allup, formanni á odda, sum vil hava staðfest, at Hugo Chavez, forseti, er sinnissjúkur og tískil ikki egnaður til at sita í forsetaembætinum.

Demokratiskt Átak royndi hetta sama í januar í 2002, men tá noktaði hægstirættur at taka støðu til spurningin.

Enn hevur eingin av hinum andstøðuflokkunum tikið undir við áheitanini á hægstarætt, men Henry Ramos Allup sigur við Reuters, at ætlanin er at samskipa andstøðuna fyri at fáa forsetan frá.

-Vit hava enn próvtilfarið frá 2002, men vit hava eisini fingið meiri tilfar afturat, og vit fara at prógva, at forsetin er óálítandi og ikki egnaður at vera forseti, sigur Allup.

## STUTT SAGT

### Neyðtók minst 50 kvinnur

Løgreglan í Japan kunngjørdi í gjár, at hon hevur tikið ein mann, sum er undir illgruna fyri at hava neyðtikið í minsta lagið 50 kvinnur og fyri umleið 300 innbrot. Løgreglan sigur, at tann 34 ára gamli Yasunori Arikawa breyt inn í íbúðina hjá einari ungari kvinnu í býnum Nagoya fyri seks árum síðani. Hon lá og svav, men vaknaði, tá hann kom innar. Hann hótti við at gera av við hana, um hon gav ljóð frá sær, og síðani neytók hann hana. Japanska løgreglan heldur, at sami maður hevur neyðtikið minst 50 aðrar kvinnur, og at hann hevur brotið inn í umleið 300 hús og íbúðir tey seinastu árini.

### USA ávarar Iran

Hvítu Húsini í Washington ávaraðu í gjár Iran ímóti at taka nakað stig, sum kann økja spenningin millum tey bæði londini. Ávaringin hevði samband við, at tríggir iranskir bátar órógvaðu nøkur amerikonsk herskip í Hormuz-sundinum við Persaflógvan um vikuskiftið. Amerikanska verjumálaráðið sigur, at fimm bátar hjá iranska tjóðarhirðini sigldu tætt at teimum amerikonsku herskipunum. Iranska stjórnin hevur váttað tilburðin, men sigur, at hann hevði einki upp á seg.

### Avstralia flýtur í vatni

Tað hevur regnað av grimd nógvastaðni har eysturi í Avstralia, og í landslutunum New South Wales og Queensland siga tey, at har hevur tað ikki regnað so illa tey seinastu tjúgu árini sum nú. Tað nógva regnið hevur elvt til vatnflóð nógvastaðni. Í New South Wales standa stór øki undir í vatni, og onnur øki eru avbyrgd, og myndugleikarnir har hava lýst summi øki í neyðhjálparstøðu, sigur BBC. Har eru fleiri hundrað fólk rýmd, tí húsini standa undir í vatni. Fleiri áir eru eisini farnar upp um áarbakkarnar, og summar áir eru so stórar, at brýrnar um tær hava fingið skaða.